## Løgtingið samtykti at avtaka lógina

**HERNAÐARLÓG**
*Ingi Rasmussen*

Danir ætla ikki at spyrja føroyingar eftir, um hernaðarliga revsilógin frá 1973 skal setast í gildi í Føroyum. Men tað hevði heldur ikki loyst seg. Tí føroyingar hava longu langt síðan tikið støðu.

Landsstýrið skrivaði longu í 1992 til ríkisumboðið, at landsstýrið á fundi 11. februar 1992 samtykti at mæla frá, at lógin og kunngerðirnar verða settar í gildi í Føroyum nú, tá tað í 30 ár hevur verið gjørligt at verið galdandi lóg fyriuttan.

Tá landsstýrið 26. oktober 2001 legði uppskot fyri tingið at avtaka hernaðarligu revsi- og rættargangslógina frá 1937, sum millum annað loyvir deyðarevsing í krígstíð, var støðan tann sama.

Í viðmerking til uppskotið skrivaði landsstýrismaðurin, at »hildið verður ikki, at tørvur er á einari hernaðarligari revsilóg fyri Føroyar«, og at landsstýrið ikki hevur broytt støðu síðan 1992.

Sjónarmiðið hjá landsstýrinum er, at viðurskiftini hjá hernaðarmyndugleikum í Føroyum eru nóg væl nøktað við lógarreglum í vanligu revsilógini og í teimum vanligu sáttmálaligu møguleikunum, sum hervaldið hevur.

»Tí er neyðugt at gera eina serlóg um avtøku av hernaðarligu revsilógini frá 1937, og tað er tað, sum skotið verður upp,« skrivaði Høgni Hoydal vegna Føroya landsstýri.

Hetta samtykti løgtingið eisini einmælt.

# Donsk hernaðarlóg kroyst niður yvir føroyingar



*Høgni Hoydal noktar fyri, at landsstýrið er kunnað um, at hernaðarliga revsilógin verður lýst fyri Føroyar*

*Mynd: Jens K. Vang*

**Deyðarevsingin í Føroyum fær loksins banahøgg. Men tað er ikki á tann hátt, sum føroyskir myndugleikar ynskja. Tí danska stjórnin setir nýggju hernaðarlógina í gildi ímóti løgtingsins vilja. Føroyingar hava í staðin mælt til, at gamla hernaðarlógin og harvið deyðarevsingin verður strikað. Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum, er sjokeraður, og kallar støðuna absurda**

**HERNAÐARLÓG**
*Ingi Rasmussen*

Fyri fyrstu ferð, síðan heimastýrislógin kom í gildi í 1948, verður ein ríkislóg sett í gildi í Føroyum ímóti løgtingsins vilja.

Danska hernaðarlógin frá 1973 er, beint ímóti einari løgtingssamtykt, send til kunngerðar í Føroyum. Tað váttar Dan Knudsen, fulltrúi hjá Ríkisumboðnum.

Sostatt gongur danska stjórnin beint ímóti teimum ynskjum, sum føroyingar hava ført fram í málinum.

### Reint danskt øki

Talan er um eitt reint danskt málsøki, og tí er ikki neyðugt at spyrja føroyingar eftir. Men tað var gamalt.

Landsstýrið er kortini kunnað, verður sagt av ríkisumboðnum, og løgtingið varð eisini kunnað, tá ríkisumboðið týsdagin svaraði einum fyrispurningi hjá Heðini Mortensen løgtingslimi.

– Verjuøkið er galdandi fyri allan ríkisfelagsskapin. Har eru ongar landafrøðiligar avmarkingar, tí alt ríkið skal verjast. Økið verður skipað við ríkislóg, og somu reglurnar skuldu gjarna verið galdandi fyri alt verjustarvsfólkið í øllum ríkinum, antin tey eru í Danmark, Føroyum ella Grønlandi. Her er onki serligt galdandi fyri Føroyar, og endamálið er at dagføra lóggávuna, sigur Dan Knudsen.

### Absurd støða

– Hetta ber als ikki til. Tað kann ikki passa.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum, ljóðar skelkaður, tá Sosialurin fortelur honum, at Ríkisumboðið hevur sent ríkislógina til kunngerðar, og at hon helst kemur í gildi um eina viku.

– Støðan er absurd. Løgtingið hevur samtykt, at hernaðarliga revsilógin skal strikast. Øll, sum hon er. Hetta er eitt dømi um, at skipanin, vit liva undir, er fullkomiliga burturvið. Um tað er rætt, at stjórnin kunnger eina lóg fyri Føroyar, uttan at hon hevur verið viðgjørd í løgtinginum, so er tað valdsmisnýtsla og brot á heimastýrislógina, sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður.

Men danskir myndugleikar kunnu gera soleiðis, verður sagt av ríkisumboðnum.

– Hetta er støðan, so leingi vit ikki hava okkara kjølfesti í altjóða rætti. So kunnu teir gera, sum teimum lystir. Men tað er ikki okkara fatan av okkara rættarstøðu, sigur Høgni Hoydal.

Ríkisumboðið vísti í tinginum á, at danski verjumálaráðharrin skal hava kunnað løgmann. Høgni Hoydal vísir avgjørdur aftur, at landsstýrið er kunnað.

– Eg havi koyrt hatta málið niðan í tingið, og tað eri eg, sum hava koyrt tað víðari til danskar myndugleikar, men eg havi onki hoyrt um hetta, so her hongur als ikki saman, sigur Høgni Hoydal.

### Lýst í vikuni

Alt málið byrjaði við, at føroyskir fjølmiðlar vístu á, at deyðarevsing er galdandi í krígstíð í Føroyum. Ein gomul lóg frá 1937 ásetir m.a., at »Den, der tjener fjenden som spion, strafffes med livet«. Og at »Livsstraf fuldbyrdes med skydning«.

USA er farið í kríggj við Irak, og Danmark stuðlar álopinum. Danmark førir eisini uttanríkispolitikk Føroya vegna, og tí er støðan eisini hon, at føroyingar eru í kríggi. Og tað merkir so eisini, at deyðarevsing í løtuni er virkin í Føroyum á pappírinum.

Tí hevur málið fingið skund. Føroyingar vilja hava deyðarevsingin og alla hernaðarliga lóggávu avtikna fyri Føroyar.

Men danska løgmálaráðið vil tað øðrvísi. Við at seta nýggju donsku lógina frá 1973 í gildi fyri Føroyar, dettur tann gamla frá 1937 burtur. Hernaðarliga revsilógin kemur í fyrsta kunngerðarblaðnum B, ið kemur út í hesi vikuni. Eina viku eftir, at lógin er lýst, kemur hon í gildi fyri Føroyar.

Hvørki Birgit Kleis, ríkisumboð, ella Anfinn Kallsberg, løgmaður, vóru at hitta mikudagin.



# Søgan um eitt fiskiloyvi



*Menninir, sum áttu Hæddina, vildu fegnir hava størri far, ……*




*…… so teir keyptu Glottan, sum var ov stórur til fiskiloyvið hjá Hæddini, og tí var neyðugt við einum loyvi afturat ……*




*…… og Falkur varð tí fingin úr flotanum, og fiskiloyvið flutt yvir á Glottan ……*




*…… sum seinni letur tað víðari aftur til Jógvan S. Soleiðis eru tveir smáir deksbátar umvegis ein 30 tonsara vorðnir partur av einum stórum línuskipi*

**Hóast politikarar yvirhøvur leggja eina við, at ætlanin við lógini um vinnuliga fiskiskap er at fáa skil á økinum og ikki at økja veiðitrýstið, er tað beint tað øvugta, sum hendir. Veiðitrýstið økist, og ofta tykist fyri uttanfyristandandi, at tað gongur hvørki so at halda skil á lógini**

**VEIÐILOYVI**
*Edvard Joensen*

Eftir tólv árum ber til at gera tveir smáir deksbátar upp á tilsamans 24 tons og ein útróðrarbátur upp á 80 tons til eitt línuskip upp á 330 tons. Uttan at nakar uttan fyri fiskivinnuumsitingina hevur gjørt nakað skeivt.

Tann 28. november 1990 fáa tveir mans eftir umsókn játtað fiskiloyvi til 30 tonsaran Glottan. Treytin er, at tveir smærri bátar, Hæddin, sum er merkt 14 tons, og Falkur, sum er merktur12 tons, fara úr veiðiflotanum. Samstundis verður tann ræðisavmarking sett á Glottan, at hann bert fær loyvi at royna við snellu.

Tann 15. februar 1991 játta eigararnir av Hæddini, ið eru teir somu, sum skulu hava Glottan, at Hæddin ikki aftur má brúkast til vinnuligan fiskiskap ella tilvirking av fiski. Somu játtan skrivar eigarin av Falki undir tveir dagar seinni. Í báðum førum hava tvey vitni skrivað undir.

Tann 15. februar 1991 skriva eigararnir av Hæddini og Glottanum eisini undir ta ræðisavmarking fyri Glottan, at hann bara má brúkast til snelluveiðu og ikki má seljast uttan so, at keyparin eisini gongur undir hesa treyt. Eisini her hava tvey vitni skrivað undir

Alt er nú greitt eftir lógarinnar bókstavi, og Glottin fer til fiskiskap, sum ætlanin var.

Hinir báðir smærru bátarnir skulu nú vera burtur úr flotanum og ikki trýsta nakran fiskastovn við veiðu.

Tó er so tað hent síðani, at Hæddin, sum í dag eitur Svananes, men skal skifta navn, tí báturin nýliga hevur skift eigara, hevur fingið fiskiloyvi aftur, og hevur verið nýttur til útróður undir Føroyum. Falkur er sambært Skipaskrásetingini skrásettur sum stuttleikafar.

Glottin rør út. Og hóast hann sambært ræðisavmarkingini frá 1991 ikki hevur loyvi til tess, rør hann við línu. Tað ger hann, tí eigararnir hava fingið fiskiloyvi til línuveiðu frá fiskivinnuumsitingini.

Glottin skiftir eigara og navn, og friður er um hann, til hann á vári 2003 kemur fram aftur í ljósið. Nú undir navninum Nakkur. Og nú skal fiskiloyvi hansara brúkast sum handilsvøra í einum skipahandli, har eitt stórt línuskip skal inn í flotan fyri tvey útróðrarloyvi.

Tann 4. mars 2003 skrivar eigarin av Nakki undir váttan av ræðisavmarking, har Nakkur verður tikin úr flotanum og ikki má nýtast til vinuligan fiskiskap undir føroyskum flaggi.

Men skjalainnlit avdúkar nú, at Nakkur als ikki hevur havt loyvi at royna við línum sambært teirri ræðisavmarking, sum gjørd er í 1991. Tað er tí beinleiðis í stríð við lógina um vinnuliga fiskiskap, at hansara fiskiloyvi verður brúkt til eitt línuskip, hóast tað verður bólkað í bólk 4B sum útróðrarbátur, siga politikarar og onnur, sum eru inni í málinum.

Við einum pennastroki tann 10. mars 2003 verður ræðisavmarkingin frá 15. februar 1991 kortini avtikin. Tá skrivar Fiskimálaráðið í tveimum reglum soleiðis til Skipaskrásetingina:

»Heitt verður við hesum á Skipaskrásetingina um at strika ræðisavmarking fyri m/b "Nakkur" KG 106 XPQG, tilmeldað 27.02. 1991, nr. 171, og skrásett 21.03.1991.«

Landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum varð av Sosialinum biðin um at staðfesta lógarheimildina fyri hesi strikan av ræðisavmarkingini. Men tað kundi hann ikki.

Hann vísti á, at talan var um eina løgfrøðiliga avgerð, sum tikin var, tí fiskivinnuumsitingin hevði gjørt eitt mistak í 1994, sum partarnir ikki vóru varugir við aftur fyrr enn í 2002. Tá lógin um vinnuliga fiskiskap kom í gildi í 1994 gloymdu fiskivinnumyndugleikarnir, at Glottin var ræðisavmarkaður til snelluveiðu og góvu honum vanligt fiskiloyvi, sum hann síðan hevur fingið heilt fram til fiskiárið 2002-2003, tá Fiskimálaráðið varnaðist mistakið.

Alla ta tíð hevði Glottin fiskað í andsøgn til tað, táverandi eigararnir skrivaðu undir í 1991 og eisini bundu møguligar komandi eigarar til. Men av tí, at so long tíð var liðin við hesum, gjørdu løgfrøðingarnir av, at báturin nú hevur hevdsrætt upp á eitt vanligt fiskiloyvi, sum eisini gevur rætt til línuveiðu undir Føroyum og á Bankanum.

Sostatt hevur eigarin av Nakki, sum Glottin i dag eitur, við fullum rætti flutt eitt fiskilovyi, sum fyri tólv árum síðan varð til frá tveimum smáum deksbátum, til eitt av teimum størstu línuskipunum í flotanum.